## DAGSINS MEINING

# Fjølmiðlaútbúgving

Eftir fjølmiðlarástevnuna seinasta vikuskifti hevur Útvarp Føroya havt áhugaverda samrøðu við føroyskan journalist um følmiðlaviðurskifti. Í samrøðuni varð ein møgulig føroysk fjølmiðlaútbúgving umrødd. Útbúgvingarspurningurin hjá føroyskum fjølmiðlafólkum var ein av mongum spurningum á ráðstevnuni, og ein niðurstøðan var, at stórur tørvur er á útbúgving og á eftirútbúgving av føroyskum journalistum.

Allar vinnur hava í dag tørv á eftirútbúgving av starvsfólkum. Ein støðug og áhaldandi eftirútbúgving av starvsfólki er ein fotrtreyt fyri menning í einihvørjari fyritøku, so hesin spurningur er sjálvsagdur, tá talan er um fjølmiðlafólk. Men eftirútbúgving er kostnaðarmikil, og føroyskir fjølmiðlar yvirhøvur eru ikki fíggjarliga sterkir. Her er ein spurningur at greiða. Ein annar spurningur er, hvar eftirútbúgvingin skal verða staðsett. Skulu vit gera avtalur við Norðurlendska Journalistháskúlan í Århus ella skulu vit hava okkara egnu tilboð her heima, ella skulu vit gera nakað heilt triðja?

Hesir spurningar eru tengdir at spurninginum um eina møguliga føroyska fjølmiðlaútbúgving. Áðurnevndi journalistur mælti til ein fjølmiðlarøktarstovn, har fjølmiðlafólk kundu fingið ráð- og vegleiðing í teirra arbeiði. Hetta er eitt áhugavert uppskot, men samstundis má ásannast, at útlitini í hesum tíðum fyri einum nýggjum stovni eru vánalig.

Hinvegin átti at borið til at tikið útbúgving av føroyskum fjølmiðlafólki upp á Fróðskaparsetrinum. Hetta kundi verið gjørt í samstarvi við ein ella fleiri útendskar lærustovnar, ið geva fjølmiðlaútbúgving. Spurningurin, um ikki júst fjølmiðlaútbúgvingin átti at verið tikin heilt ella lutvíst í Føroyum, var av góðum grundum umrøddur á ráðstevnuni. Fróðskaparsetrið hevur drúgvar royndir við júst slíkum skipanum. Spurningurin, hvussu ein slík skipan eigur at verða sett saman í smálutum, eigur at vera umrøddur millum Setrið, Blaðmannafelagið og avvarðandi myndugleikar. Tað er als einki at ivast í, at tørvur er á eini føroyskari fjølmiðlaútbúgving, og vónandi verður málið tikið upp á røttum støðum, hóast tíðirnar ikki tykkast vera til nðggj og útreiðslukrevjandi initiativ. Hinvegin eru fjølmiðlarnir ein so týðandi táttur í okkara mentan og fyri menningina í samfelagnum, at útbúgvingarspurningurin ikki longur kann liggja á láni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Miðbýurin skal kollveltast

### Rættleiðing til óseriøsa og manipulerandi yvirskrift í Sosialinum

**Jan Christiansen**
*Borgarstjóri*



Eg var ikki sørt bilsin, og nakað skelkaður, tá forsíðan á Sosialinum fyri hósdagin var kunngjørd. Stór mynd av borgarstjóranum í havn, har hann sigur at miðbýðurin skal kollveltast, og at gomul hús skulu takast burtur, soleiðis at høghús kunnu verða bygd ístaðin.

Rein vandalisma er tað fyrsta í rennur fólki til hugs. Tíverri (vil eg pástanda) hevur leiðslan á Sosialinum tilvitað útstilla borgarstjóran í Havn, sum vandalistin. Tíðindablaðið Sosialurin er so tætt knýtt ávísum politiskum flokki, at blaðið hevur stórar trupulleikar at bera tíðindi objektivt.

Tá eg sigi at yvirskriftin er óseriøs og manipulerandi, er tað tí, at hon hevur lítið og einki við greinina inni í blaðnum at gera. Haldi, at tíðindamaðurin er komin rættuliga væl frá frásøgnini og er hendan rættleiðing als ikki nøkur ábreiðsla til hansara. Tvørturímóti er tað gleðiligt at tíðindafólk vísa áhuga fyri, hvat fyriferst í høvuðsstaði okkara.

Lat meg sláa fast, at kommunan als ikki ætlar at kollvelta nakran miðbýð (samb. orðabókini er at kollvelta at koyra um koll ella at fella). Og sjálvsagt er ikki nøkur ætlan um at koyra miðbýin um koll ella at fella hjártað í býnum.

Blaðmaðurin á sosialinum ynskti at fáa eina frágreiðing um ætlanina, sum umsitingin legði fyri Byggi og Býarskipanarnevndina, ið er um niðara part av Tinghúsvegnum. Býararkitekturin, tekniski stjórin og eg sjálvur greiddi tíðindamanninum frá hvørjum ætlanum byggideildin arbeiðir við. Sjálvsagt kom prátið inn á miðbýin sum heild; eisini um eina umsøkn um at fáa byggiloyvi til ein rættuliga stóran bygning niðan fyri Havnar Bio.

Samrøðan var um, hvussu vit kunnu fáa góðan trivnað í miðbýðin, uttan at skula kollvelta hann, og um hvat gerast kann fyri at varðveita miðbýðin sum hjartað í býnum. Víst var á, at kommunan hevði ognað sær tvey hús við Tinghúsvegin (Heinesens- og Sloanshús), júst fyri at kunna varðveita part av hugnaliga umhvørvinum har. Tí harmar tað meg, at Sosialurin (tilvitað) manipulerar og misbrúkar eina góða og sakliga grein frá einum av teirra blaðmonnum til at kunna sverta borgarstjóran út.

Vónandi hava fólk lisið greinina: "Stórar broytingar í miðbýnum í Havn" og harvið kunna staðfest, at lítil og eingi samanhangur er á forsíðuni og sjálvari greinini.

# Stórar broytingar í Havn




Tað er fallið borgarstjóranum í Havn fyri bróstið, at Sosialurin í gjár slær stórt upp á forsíðini, at kollveltandi broytingar skulu gerast í miðbýnum í Havn.

Býráðið hevur ætlanir um at broyta Tinghúsvegin frá Áarvegnum niðan til Bøkjarabrekku. Minkast skal um ferðsluna við at gera gøtuna meira átøka eini gongugøtu, og gongurás skal gerast gjøgnum urtagarðar eystan fyri Tinghúsvegin. Plantast skal og torg gerast, og gamla Vaglið í garðinum hjá Jacob Lützen skal fáast framaftur.

Hetta vísir ætlanin hjá býráðnum, sum var viðgjørd á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini mánadagin, sum eisini varð greitt frá í Sosialinum í gjár.

Eisini hevur ein privatmaður, sum eigur húsini hjá Anton Degn, ætlanir um at flyta hesi húsini av grundini og byggja høgan bygning har – sum eisini er fult í tráð við byggisamtykt býráðsins.

Alt hetta eru stórar broytingar. So stórar broytingar, at hetta hevur áhuga hjá lesarum – ikki minst í Havn.

Tá forsíðan varð gjørd á Sosialinum mikudagin, varð hetta mett at verða væl egnað til høvuðssøgu, tí mett varð, at her var talan um »kollveltandi« broyting – eina markanta broyting, ella eina týðuliga broyting, nakað, sum er heilt øðrvísi, enn tað hevur verið.

Vit kunnu bara greitt afturvísa, at leiðslan á Sosialinum hevur nakran áhuga í »tilvitað at útstilla borgarstjóran í Havn sum vandalist«. Okkara endamál er at greiða lesarum frá tí, ið m. a. Tórshavnar Býráð fæst við.

**Eirikur Lindenskov**
**blaðstjóri**

# 8. mars – Altjóða Kvinnudagurin

verður hildin í Mettustovu mánakvøldið 8. mars kl. 19.

Kinna Poulsen hugleiðir um kvinnur og list, orðið verður frítt um aktuel kvinnumál við einum Speakers Corner og annars verður sangur og ábit.

Kostnaður 30 kr.

**Kvinnufelagið**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Reyðabók kastar myrkar skuggar yvir Breckmann og Kallsberg

**Vísindaliga sæð er Reyðabók ein stór skandala. Men hon er eisini ein politisk skandala. Og Anfinn Kallsberg stendur við ábyrgdini**

**Sjúrður Skaale**



Í ár 2000 varð gjørt av, at føroyingar skuldu hava vitan um, hvønn týdning Føroyar høvdu fyri Sovjetsamveldið. Vit skuldu hava eina Reyðubók eins og vit høvdu fingið eina Svørtubók. Sjálvsagt.

400.000 krónur vórðu settar av. Føroyskir søgufrøðingar gleddu seg til uppgávuna, sum øll væntaðu, at fleiri fóru at vera um at loysa. Ein maður, sum var útbúgvin í skjalarannsóknum í Moskva, var millum teir, sum stóðu til reiðar at vera við í arbeiðinum. Hetta var ein spennandi avbjóðing, sum fór at menna føroyska søgugransking.

Men einki hendi fyrsta árið. Eingin visti hví. Tað ljóðaði, at Anfinn Kallsberg hevði brúkt tær 400.000 krónurnar til okkurt annað.

Árið eftir vórðu aftur settar 400.000 krónur av. Men aftur vórðu føroysku søgufrøðingarnir hildnir fyri spott.

Tí knappliga boðaði Anfinn Kallsberg frá, at ein dani einsamallur skuldi standa fyri øllum. Eingin føroyingur skuldi so mikið sum sleppa at fylgja við í arbeiðinum. Eingin avbjóðing, eingin førleikamenning og eingin króna skuldi latast føroyingum.

Danin var tann ógvuliga kontroversielli og ultra høgravendi Bent Jensen.

Hóast tað formliga var Anfinn Kallsberg sum tók avgerðina um at seta Bent Jensen, mundi hetta helst vera sum við so nógvum avgerðum hjá Kallsberg: Hann hevði onga sum helst ávirkan á hana sjálvur. Tað var Óli Breckmann, sum stýrdi.

Orsøkin til, at Óli Breckmann vildi hava júst Bent Jensen - og bara Bent Jensen - at skriva føroyska søgu, man vera rættiliga uppløgd: Óli vildi als ikki hava nakra søgugransking, men eitt politiskt amboð. Hann vildi hava ein lista við nøvnum, sum kundu illteinkjast fyri at hava njósnast fyri Sovjetsamveldið.

**Groteskir pástandir**

Nú er Reyðabók hjá Bent Jensen so komin. Men Bent hevur ikki gjørt tað, hann skuldi gera. Vit fáa lítið og einki at vita um, hvussu Sovjetsamveldið metti um Føroyar undir kalda krígnum.

Í staðin byggir bókin fyri mesta partin á skjøl úr donskum goymslum. Tað er sjálvsagt sera áhugavert at síggja, hvussu nógv danska fregnartænastan hevur njósnast í Føroyum. Men Bent Jensen nýtir hesi skjøl á ein hátt, sum ger bókina til eina stóra skandalu.

Tað mest groteska dømið er kanska um Halgir Winther Poulsen, sum verdur lagdur undir at vilja bjóða USA og Sovjet herstøðir í Føroyum, og síðani selja Føroyar til tann, sum bjóðar mest. Tað er møguligt, at Halgir hevur sagt okkurt tílíkt onkuntíð - men hann hevur neyvan meint tað í álvara. Og tað er heilt groteskt at maðurin, í eini bók sum Føroya Landsstýri fíggjar, nú verður lagdur undir hetta sum var tað ein verulig ætlan, hann hevði.

Ein annað dømi er, at Erlendur Patursson og Tjóðveldisflokkurin, uttan nakað prógv, verða lagdir undir illgrunasamt virksemi. Til tess at »undirbyggja« hetta, sigur Bent Jensen m. a. soleiðis: »Paturssons parti er af den politiske modstander Óli Breckmann blevet karakteriseret som »et marxistisk løsrivelsesparti«, der ønskede NATO slettet af verdenshistorien«.

Álvaratos! Hvat hevur Óli Breckmann ikki kallað fólk og flokkar millum ár og dag? Skal tað, hann í síni sjúkligu útspilling hevur sagt um onnur, nú lyftast upp sum søgulig fakta? Hvussu kann Føroya Landsstýri fíggja og leggja navn til slíkt?

**Føroyskir hálvmordarar**

Eitt triðja dømi er, tá Bent Jensen roynir at seta føroyskar sosialistar í samband við útlendskar drápsmenn. Í einum broti stendur soleiðis: »Færøske Socialisters afdeling i Torshavn blev efterhånden meget radikaliseret og indtog standpunkter, som næsten var identiske med den danske organisation *Kommunistisk Forbund Marxister-Leninister* (KFML). Medlemmerne af den såkaldte Blekingegadebande - en bevæbnet, revolutionær organisation, der under et væbnet røveri dræbte en politibetjent i København - kom fra KFML.«

Skal mann gráta ella flenna? Føroyskir sosialistar høvdu sjónarmið, sum líktust teimum hjá KFML - og fólk frá KFML drupu einaferð ein politist! Við slíkari próvførslu ber til at seta øll heimsins fólk í samband við onkran drápsmann. Hetta snøgt sagt rein idioti.

Men Bent Jensen er øgiliga stoltur av sínum evnum at avdúka farligar føroyingar, og sum ein annar Erasmus Montanus heldur hann elegant fram í sama spori:

»I 1978 abonnerede Færøske Socialister på den italienske revolutionære avis *La Voce Operaia* (Arbejderens stemme), som var organ for et italiensk marxistisk-leninistisk parti, der havde forbindelse til den revolutionære, marxistiske terrororganisation *Brigate Rossi* (De røde Brigader). Det var Brigate Rossi, der i 1978 myrdede lederen af de kristne demokrater, Aldo Moro.«

Fantastastiskt! Føroyskir Sosialistar hildu eitt blað, sum var málgagn hjá einum flokki, sum hevði samband við Reyðu Brigadurnar, sum drupu Aldo Moro!

Soleiðis! So er ið hvussu er eingin ivi um, hvussu vandamikil tey navngivnu fólkini í Føroyskum Sosialistum vóru! Hevði Bent Jensen sloppið at hildið fram hevði hann uttan iva eisini funnið útav, at Føroyskir Sosialistar tóku fult undir við teimum, sum drupu bæði Kennedy, Olof Palme og John Lennon.

**Kanónin slær bakk**

Dugnaligir og nærlagdir føroyskir søgufrøðingar vístu, at teir dugdu síni ting, tá teir skrivadu Svørtubók. Men teir sluppu ikki so frægt sum at vera við í arbeiðinum at skriva Reyðubók.

Anfinn Kallsberg vildi ikki!

Anfinn Kallsberg setti Bent Jensen í staðin!

Og tað var - helst - Óli Breckmann, sum tók hesa avgerðina fyri Anfinn Kallsberg. Og Óli ynskti sær neyvan eina søgiliga greining, men eina bók, sum hann kundi brúka ímóti sínum politisku fíggindum.

Men hóast Bent Jensen dúgliga roynir at gita og snara og seta saman til tess at avdúka føroyskar svíkjarar, so er einki sum líkist einum prógvi um nakað. Tað einasta Bent Jensen prógvar er, at hann ikki er vísindamaður, men politiskur kúlustoypari.

Men kúlurnar fara ikki langt. Tær raka ongan uttan Bent sjálvan. Og so Anfinn Kallsberg og Óla Breckmann.

**Eina kanning afturat?**

Tá alt hetta er sagt so má leggjast afturat, at bæði føroyskir sosialistar og føroyska friðarrørslan í fleiri førum mistóku seg undir kalda krígnum. Sum m.a. Vaclav Havel hevur víst á, gekk europeiska friðarrørslan stundum - umenn ótilvitað og óviljað - ørindi fyri einaræðislond. Og tað hevði verið ógvuliga viðkomandi vitan, um so var, at føroyingar høvdu njósnast fyri Sovjet ella tikið undir við og aktivt stuðla harðskapi.

At gera sum Bent Jensen - fyri almennar pengar at insinuera at fólk hava gjørt hetta uttan at hava nakað prógv - er sjálvsagt undir alt lágmark.

Men vit eiga altso ikki at vera bangin fyri at kanna, um føroyingar hava verið, sum aktivt hava stuðlað ódemokratiskum, totaliterum og blóðdálkaðum stýrum.

Landsstýrið kundi t.d. rindað onkrum 400.000 krónur fyri at finna útav, um nakar føroyingur var, sum opið, treytaleyst og við gløðandi eldhuga stuðlaði teimum fasistisku og rasistisku hópdrápsmonnum, sum ráddu fyri borgum í t.d. Chile og Suðurafrika...

# Kunnu vit fáa Formel 1 aftur í SVF

Tá DR plagdi at senda Formel 1, sóu vit vanliga koyringarnar beinleiðis í SVF sum samsendingar við DR. Tá TV3 seinasta ár keypti sær rættindini, mistu vit møguleikan at síggja koyringarnar.

Í ár er tað TV2 sum eigur rættindini, men eg síggi at fyrsta koyringin 7. mars, er ikki skrásett hjá SVF, SVF plagar annars at hava fínt samstarv við TV2. Eg vil tí fegin heita á leiðsluna í SVF um at fáa hendan vælumtókta ítrótt aftur á skíggjan, antin í samstarv við TV2 ella í samstarv við eitt nú norskt sjónvarp.

Eftir olympiadurnar og heimsmeistaraheitið í fótbólti er formel 1, mest eftirhugdi ítróttur í heiminum, og Føroyar er einki undantak.

Vinarliga

**Niels Uni Dam, Magnus Jakobsen, Petur Eyðun Dam, Magni E. Dalsgaard, Hans Suni Eiriksfoss, Jón K. Joensen, Ronald Poulsen og Sveinur Gullfoss**

# Formel 1 aftur í SvF?

**Mikkjal Helmsdal**
*sjónvarpsstjóri*



Í Sosialinum og Dimmu er lesarabræv, har 8 mans spyrja um SvF fer at senda Formel 1 beinleiðis í samstarvi við TV2.

Signalið, sum SvF higartil hevur móttikið TV2 ígjøgnum, er sera svikaligt, og vit hava fleiri ferðir brent okkum av hesum, tá vit hava sett ítróttarsendingar hjá TV2 á skránna. Seinast hendi hetta, tá vit skuldu samsenda semifinalurnar og finaluna í EM í hondbólti hjá monnum. Tá til stykkis kom, var signalið so vánaligt, at tað var ógjørligt at senda tað út.

Eftir mislukkaðu EM-sendingarnar hava vit tikið ta avgerð, at vit senda ikki aftur beinleiðis frá TV2. Tí skulu hesir 8 spyrjararnir ikki rokna við at siggja Formel 1 í Sjónvarpi Føroya. Í hvussu er ikki so leingi hendan kappingin verður send á TV2.

# Sjónleikarhúsið eitt bordel ???

**Jóanes K. Andreasen**

Havi beint nú verið í Sjónleikarhúsinum eitt ørindi, og slíka skelkandi sjón, sum eg har sá, havi eg ikki fyrr sæð í Sjónleikarhúsinum.

Tað fyrsta eg beri eyga á liggjandi á borðinum, er ein plakat til leikin sum skal framførast í sjónleikarhúsinum í næstum. (myndin skal vera ónevnt)

Skelkurin bleiv ikki minni, tá eg beri kenslu við andlitini á plakatini, og fái at vita, at tað er mynd av sjónleikaranum, aftan á at hava svølgt henda bitan við blandaðum kenslum, fari eg so inn í sjálvan salin, og har er ikki minni skelkandi sjón, allur salurin er gjørdur um til eitt sætt skøkuhol, ja, sum at stíga inn í ein vánaligan western av versta slag.

Til síðst, hví skal ein sjónleikur hava 18 ára aldursmark? Hevur sensururin góðtikið hetta?

Eg spyrji bara.

Fullveldi og moralur? er alt er fari fyri bakka.?

Fy fy…